

## Símun og teir spældu javnt

Í Íslandi er landskappingin ikki byrjað enn, men har verður spælt í steypakapping, sum teir kalla Lengjubikarinum. Keflavík, sum hevur Símun Samuelsen á liðnum, spældi um vikuskiftið ímóti Fram, og dysturin endaði við javnleiki. Keflavík hevur spælt seks dystir í hesi kappingini, og teir hava fingið 10 stig burtur úr teimum dystunum. Tað røkkur til eitt fjórða pláss.

## Fremad tapti stórt

Kappingarárið í næstbestu donsku deildini byrjaði aftur í dag, og liðið hjá Toda Jónsson, Fremad Amager, fekk eina sera torføra byrjan, tá ið teir skuldu møta AGF. AGF lá undan dystinum á einum skuffandi 6. plássi, hóast teir undan kappingarárinum vórðu mettir sum favorittar at vinna deildina.

Fremad Amager fekk einki gjørt við AGF, sum vann 4-1. Føroyingurin í Fremad Amager, Andrew av Fløtum, var ikki við vegna skaða. Fremad Amager liggur á 12. plássi, tvey stig undan niðurflytingini.

# – Tað var heilt galið hjá okkum

**- Tað var heilt galið hjá okkum fyrr í ár. Vit spældu illa í grundspælinum, men ímóti endanum av kappingini høvdu vit tað besta liðið, sigur Jónleif Sólsker, venjari hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Venjarin hjá Kyndli, Jónleif Sólsker, var sum vera man ovurfegin, eftir at hann og hansara leikarar vunnu meistaraheitið leygardagin. Hann helt tó, at hesin dysturin var annarleiðis enn fyrsti dysturin.

- Ja, hesin dysturin var heldur annarleiðis. Teir mansverja Høgna frá byrjan, og sjálvt um vit høvdu væntað hetta, so blívur tað ikki tað sama.

Hann helt eisini, at viljin gjørdi munin at enda hjá Kyndli, tá teir koma aftur, eftir at hava verið aftanfyri við trimum málum.

- Vit eru aftanfyri við trimum málum seint í dystinum, men menn kempa veruliga fyri sakini, og hetta gevur úrslit at enda, tá vit vinna dystin.




*Við einum óførum endaspurti tryggjaði Kyndil sær FM-heitið í manshondbólti*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Vendu gongdini

At enda spurdu vit Jónleif, hvussu tað bar til, at liðið hjá Kyndli var so nógv broytt frá grundspælinum til endaspæli.

- Tað var heilt galið hjá okkum fyrr í ár. Vit spældu illa í grundspælinum, og hetta haldi eg, at spælararnir sóu sjálvir. Teir byrja at kempa nógv harðari, og hetta var sera gott. Um vit hyggja burtur frá byrjanini av kappingini, so haldi eg, at meistaraheitið er uppiborið, tí vit høvdu tað besta liðið ímóti endanum av kappingini, segði ein fegin Jónleif Sólsker eftir dystin.

# – Hava verið best í endaspælinum

**- Trý mál er einki í hondbólti, og menn geva seg 100 % síðstu løtuna, og hetta gevur úrslit í dag, segði mansvardi profilurin hjá Kyndli eftir FM-dystin í Vestmanna**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Høgni Klein hevur verið ein av mest eyðsýndu leikarunum hjá Kyndli í endaspælinum, og VÍF valdi eisini at mansverja hann allan dystin í Vestmanna leygardagin. Vit fingu orðið á hann eftir dystin.

- Hetta var ein ordiligur Vestmanna og Kyndil dystur. Bæði liðini geva seg fult út, og tað var tætt allan vegin.

Móti endanum var Kyndil aftanfyri við trimum málum, men so raknaði Kyndil brádliga við. Vit spurdu Høgna, hvat tað var sum gjørdi, at Kyndil kom aftur í aftur.

- Tað er bara viljin. Tá man hevur viljan, so kann man mest sum alt. Trý mál er einki í hondbólti, og menn geva seg 100 % síðstu løtuna, og hetta gevur úrslit í dag.

### Uppiborið FM

At enda spurdu vit spælstýraran, hvat hevur verið munurin frá grundspælinum til endaspælið.

- Vit byrjaðu seint í ár, bæði hvat viðvíkur at seta venjara og við sjálvari venjingini. Vit koma heldur ikki ordiliga í form fyrrenn í januar, og tá eru vit helst besta liðið í landinum.

- Um vit hyggja eftir endaspælinum, so vil eg siga, at meistaraheitið er uppborið, tí her hava vit verið tað besta liðið, segði ein stórsmílandi Høgni Klein eftir dystin.

